# *Hin heilagi login*

*Jens Pauli Heinesen*

Lesur tú um tað, sum hendi í tingstovuni annan jóladag fyri hundrað árum síðani, kemur tú fram á orð og máliskur, ið ljóða heldur sjáldsamt í okkara oyrum, tey líkasum hóska ikki í tíðini, tey eru sum fremmandir fuglar, ið vit hava eina hóming av einaferð hava verið til, men sum nú eru vorðnir søga, ið ikki tekst aftur.

Har verður millum nógv annað skrivað um „hin heilaga logan í barminum á monnum". Um „elddópin", skald og hugsjónarmenn fingu. „Undrið hendir, landsmenn hittast í hugtakandi sameining", og tá „kom føroyska medvitanin rættiliga undan kavi".

Eitt og hvørt mannalív, sum røkkur upp í ellisár, hevur farið ígjøgnum sín barndóm, ungdóm, manndóm og aldurdóm. Eisini tjóðirnar hava sína lagnu, eisini tær skulu ígjøgnum tey tíðarskeið, ið gera eina lívsævi, bert eru teirra tíðarteinar ólíka drúgvari enn ein mannalagna mált við menniskjans alin.

Skulu vit fara eftir hesari myndini, hava vit havt ein langan og strangan barndóm, um vit hugsa um ta mentanarligu síðuna av søgu okkara. Vit hava grulvað leingi og stakrað, til vit endiliga náddu fermingaraldri.

Ferming merkir konfirmatión, og hyggi eg í latínsku orðabókina at upprunatýdninginum av hesum orði, er hann hesin: Styrking, festing, uggi, eggjan ella sum tað stendur: Eggjan og styrking av einum stakrandi, mótlítlum ella sorgarbundnum sinni. Í hesum týdningi var jólafundurin okkara mentanarliga konfirmatión.

Hvat hildu so fólk um handa konfirmantin? Vóru tey errin av honum, og ynsktu tey honum góða eydnu við framtíðini? Eftir øllum at døma hevur hann í flestra manna eygum als ikki verið nakar strálandi svanaungi, men heldur tann mishátti dunnuungin, ið fáur vildi kennast við, tí skrivað stendur eisini: „Trýst elur móttrýst, um rætt og bragdligt lív skal skapast". Tað vóru ikki øll, ið sóu hin heilaga logan í barminum. Tey snerktu við og fýltust á og stakraðu framvegis. Man tað vera hetta, Chr. Matras hugsar um, tá ið hann yrkir:

Summi lúgvast tíðliga
og leggjast fyri,
onnur halda ferðin
er uttan virði,
fylgja so við streymi
uttan vilja –
ganga øll í dreymi
og einki skilja

So í sælum stundum
hendir lívsins undur,
blindir fáa megi
at lata eygu sundur,
liva ríkar løtur,
ið leingi minnast,
síggja allar gøtur
saman finnast.

Eg var av góðum grundum ikki við í tingstovuni annan jóladag 1888, og kortini havi eg eina dýra kenslu av at hava verið har. Úr hesi tíð lýsir ein glæma av upphavi, ein upphavsins glæma, ið eg kenni aftur frá mær sjálvum, tí hon lýsti og strálaði eisini í mínum egnu ungdómsárum, ikki í sjálvari tíðini, men í mær sjálvum, tá ið medvitanin kemur undan kavi, og hin heilagi login og lívsins undur búgva hugtakandi í tær. Tá ið tú gongur kykur eftir at liva lívið, at skapa og avrika nakað. Tað var vónarinnar tíð, dreymanna tíð, frammanfyri lokkaðu teir túsund møguleikarnir, ið fyltu teg við treysti og skapanargleði.

Júst soleiðis, hugsaði eg mær, var hetta tíðarskeiðið í søgu okkara, vónarinnar og dreymanna tíð, tíðin við teimum túsund møguleikunum. (Ein tíð, eg innast inni øvundi teimum). Tað var tíðin, tá ið skapanargleðin sum ein upphavsins glæma tók at lýsa á morgunhimmalinum. „At tað verður eitt bál, um at hvør mannasál leggur sín neista til hin sama eld“.

Hvussu hevur so gingist hesi hundrað árini við hini tiltiknu endamálsgreinini? Er Føroya mál komið til ta æru, tey droymdu um? Halda føroyingar nú saman, og eru vit nú gingnir so nógv fram í øllum lutum, at vit eru vorðin sjálvbjargin? Ja, hvussu hevur gingist við teimum stóru dreymunum og teimum ríku vónunum?

Vit kenna svarið. Tað gera tey, ið tá livdu, av góðum grundum ikki, men høvdu vit kunnað sett teimum hesar spurningarnar, og høvdu tey kunnað svarað, so kann eg hugsa mær, at tey høvdu víst seg ovfarin og ovurfegin, tí at tey vistu ikki – hin minniliga jóladag – um tey vóru komin saman til eina jarðarferð ella til ein uppreisnardag. Mong, helst tey flestu, trúðu ikki, at málinum og føroysku mentanini vóru lív lagað, og høvdu givið seg til tols við, at okkara lagna fór at verða Hetlands. Nøkur hildu, at tað gekk alt ov seint og striltið: „Sova vilja allir enn, vilja hava frið, sova konur, sova menn, unga fólkið við“, sang ein persónur, ið hevði fingið sín elddóp har.

Hann var ikki tann einasti, ið sang. Neistin var tendraður og festi í. Fræið var sáað og tók at spretta, ein planta kom undan, fleiri og fleiri bløð festu seg á hana, einki kundi steðga hesum vøkstri. Fram, frímansættin unga. Fólk fingu málið fyri seg, tað, sum tey næstan høvdu mist, tey fóru at syngja, ein sangur legði seg aftur at einum øðrum, sangirnir komu út í bók, ein skaldsøga sá dagsins ljós, eitt søgusavn, eitt yrkingasavn, ein barnabók, runt umkring fór at grógva, seint men seigan. „Tit skulu bróta risans høll, tussan taka á hondum, fella niður liðið alt og loysa menn úr bondum“, kvað sami persónur. – „Ja, nú ber fram móti betri tíð, og fríður gróður her sæst í líð“, sang ein, ið rópti seg Gunnleyg.

Men tað var ikki bara innan fyri mentanarlívið, tað tók at kvaklast við og bragda, tí sum við eitt avrátt tekin festi eisini í aðrar samfelagstættir. Alt samfelagið tók at remb-

ast. Konfirmatiónin breiddi seg og sprongdi mark bæði innan fyri politikk og vinnulív. Fakfeløg sóu dagsins ljós. „So bregði ei heldur tú úr ætt, men rúk á føtur og krev tín rætt".

Henda kollveltingin hendi ikki við ein brest sum ofta aðrastaðni. Tað var ein skriða, sum í fyrstuni bert skreið avstað, men steðgast kundi hon ikki, tvørturímóti tók hon alt meira ferð á seg. Úr tí fræi, ið sáað var, spratt skapanargleðin, undranin um at liva og vera til. Medvitanin um, at tú livdi í eini tjóð, ið hevði sítt egna mál, sína egnu mentan og sína egnu søgu. Medvitanin um, at tú hevði høvi til og skyldu at geva øllum tí, sum í tær býr og bilgist, lív og skap á ymsan hátt, tað veri í skaldskapi, list, tónlist, handverki og annars øllum tí, ið lívið hevur at bjóða – alt samalt út frá tínum egnu møguleikum og fyritreytum. „Ver stór mín sál í dagsins royndarstund".

Tað ber valla til at geva jólafundinum æruna fyri alt hetta, hann var bert skumpið, ið skuldi til at fáa gongd á. Helst var tað so, at jørðildi var har frammanundan og lá og beyð okkum at „loysa seg úr fjøtrum".

Gera vit okkum ta hugsanarroynd, at vit einki jørðildi høvdu at seta lív í og einki fræ at sáa, hvussu hevði so sæð út? Hevði okkara lagna tá verið Hetlands? Høvdu vit í dag tosað eina danska dialekt, ongar egnar sangir sungið, ongar bøkur skrivað, einki yrkt, einki skapað? Høvdu vit ongan Hans Andrias Djurhuus havt, ongan Martin Joensen, ongan Heðin Brú, ongan Chr. Matras, einki av øllum hesum, sum vit eru so errin av og so góð við? Hevði undirritaði tá – tí at hann ongantíð hevði kent nakran elddóp, ongan heilagan loga, onga medvitan og onga skapanargleði – hevði hann tá bert havt tómar bókhillar at víst á og bert av og á kroyst burtur úr sær onkran veitslusang og onkra konfirmatiónssøgu á eini danskari dialekt? Høvdu vit einki Fróðskaparsetur havt, einki Norðurlandahús, einki egið sjónleikarhús, einki útvarp, einki sjónvarp, ongan egnan skúla, einki listasavn, einki merki at víst á heimsins høvum og ítróttavøllum? Høvdu vit tá bara fallið í fátt og einans ant í eini aðrari tjóð? Ja, hvussu hevði endamálsgreinin frá jólafundinum sæð út?

Vit kenna ikki svarið, men eg fari at loyva mær at svara, ja, eg frykti fyri, at soleiðis hevði tað sæð út.

„Hevur tú einki at flýggja uttan ta tómu tægu, ert tú ein deyður maður".

Men undrið hendi. Málið hevur ongantíð verið ríkari enn í dag, skapanargleðin ongantíð størri, tjóðin ongantíð meira livandi. Tað vellir og grør um alla leið sum ongantíð fyrr. Barndómurin, tann langi og strangi, er farin aftur um bak, og ungdómstíðin, tann bragdliga og óttaleysa, hevur tikið við. Tann misshátti dunnuungin er ein strálandi svanaungi.

Sjálvsagt veit eg, at vit ikki eru komin á mál. Nær verða vit tað. Sjálvsagt veit eg, at mangt er at fýlast á. Tað verður tað altíð. Men sett upp ímóti jólafundinum fyri hundrað árum síðani er myndin her omanfyri – eftir mínari áskoðan – als ikki á skeivari leið.

Men um hundrað ár, hvussu sær tá út? Eins lítið tey á jólafundinum kendu svarið, eins lítið kenna vit tað. Tað blæsur í vindinum. Stendur skrivað í sandi.